

Oljuboring í Karahavinum. Mynd: Rosneft

# Rosneft útsetir oljuboring í Karahavinum

**Jógvan Hugo Gardar**

03.02.2015 - 11:51

Oljan.fo

Russiska oljufelagið Rosneft hevur, sambært norsku Finansavisen, boða at felagiðútsetur oljubroringina í Karahavinum, norðanfyri Russland, til 2016.

Samstundis er greitt at handilsforðingarnar millum Noreg og Russland nú fáa avleiðingar fyri norska veitingarfelagið North Atlantic Drilling. Fyritøkan missir eftir øllum at døma avtaluna við Rosneft um hesa oljuboringina í Karahavinum. Rosneft sigur at tey umhugsa at finna ein avloysara fyri North Atlantic Drilling.